Bjarni Djurholm:

# Einki skeivt í sambandi við nevndarvalið í Framtaksgrunninum

**Nevndarlimirnir í Framtaksgrunninum eru einans valdir eftir fakligum førleika, og einki skeivt fór fram, tá øll nevndin 1.apríl í ár varð skift út. Tað var greiða niðurstøðan hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, tá hann fríggjadagin svaraði einum skrivligum fyrispurningi frá Torbjørn Jacobsen, løgtingsmanni**



*– Einki skeivt fór fram, tá øll nevndin í Framtaksgrunninum í vár varð vald av nýggjum, og heldur eingin politisk ætlan liggur aftanfyri. Tað sigur Bjarni Djurholm, sum í løgtinginum fríggjadagin svaraði einum skrivligum fyrispurningi frá Torbirni Jacobsen, tingmanni*

NEVNDARVAL
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tað vakti miklan ans og ikki sørt av rumbli, tá øll nevndin í Framtaksgrunninum í vár varð skift út. Sambært viðtøkunum fyri grunnin velur landsstýrismaðurin í vinnumálum á hvørjum ári, tann 1.apríl, fýra av fimm nevndarlimum í grunninum. Hesir fýra velja sjálvir fimta nevndarlimin, og nevndin skipar seg sjálv.

Torbjørn Jacobsen setti í hesum sambandi Bjarna Djurholm ikki færri enn 13 spurningar um Framtaksgrunnin og nevndarvalið í vár. Tingmaðurin fyri Tjóðveldisflokkin vildi millum annað hava at vita, eftir hvørjum metingarstøði nevndarlimirnir í Framtaksgrunninum verða valdir. Hann spurdi, hvør orsøkin var til, at undanfarna nevndin í grunninum ikki hevði hug at halda fram og um ósemja var millum nevndina og landsstýrismannin, hvussu nógvar av nýggju nevndarlimunum landsstýrismaðurin valdi eftir tilráðing frá umsitingini og um umsitingin møguliga mælti frá at velja nakran teirra. Eisini vildi Torbjørn Jacobsen hava at vita, hvørji mál nýggja nevndin kann røkka, sum fyrrverandi nevndin ikki megnaði at røkka.

Torbjørn Jacobsen sigur í sínum viðmerkingum, at tað fyrr var ein ringur politiskur óvani, at flokkar í samgongu valdu sínar egnu í ymsar nevndir og ráð, ofta við eini flokspolitiskari ætlan. Tingmaðurin metir, at hetta lagið hevur tókst heldur frægari seinastu árini, men nú tykist aftur vend vera komin í, og sipar til nevndarvalið í Framtaksgrunninum í vár.

### Nevndin er óheft

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum sigur í sínum svari til Torbjørn Jacobsen, at nevndin bara verður vald eftir fakligum eginleikum, og nevndin virkar óheft av landsstýrismanninum. Bjarni Djurholm sigur, at tað tó einki er sum forðar landsstýrismanninum í vinnumálum at samskifta við nevndina og greiða henni frá vinnupolitiskum ætlanum og ynskjum um strukturbroytingar í vinnuni. Hann nevnir í hesum sambandi, at í summar boðaði landsstýrið Framtaksgrunninum frá, at einskiljing av almennu fyritøkunum, m.a. Fiskavirking og Fiskasøluni, verður ikki framd fyrr enn ein virðisbrævamarknaður er farin at virka. Eisini er Framtaksgrunnurin kunnaður um politiska viljan um møguliga at avmarka møguleikan hjá útlendingum at keypa seg inn í føroysku fiskivinnuna.

### Nevndarvalið

Bjarni Djurholm sigur, at áðrenn hann skuldi velja nevndina í Framtaksgrunninum av nýggjum 1. apríl, fekk hann at vita frá einum av nevndarlimunum, at viðkomandi hevði ikki hug at halda fram. Harumframt var ein nevndarlimur búsitandi uttanlanda, og tað metti hann vera óheppið. Bjarni Djurholm sigur, at hann ynskti, at hinir báðir limirnir, sum hann hevði valt í nevndina, skuldu halda fram, og tí var talan um at velja tveir nýggjar limir. Bjarni Djurholm boðaði nevndarlimunum, sum eftir ætlan skuldu halda fram í nevndini, frá, at hann hevði ein ávísan persón í huganum til at gerast formaður í nevndini. Tá teir báðir nevndarlimirnir fáa hetta at vita, gera teir at at siga seg úr nevndini fyri Framtaksgrunnin. Bjarni Djurholm sigur, at hetta kom óvart á seg, men at hann nú noyddist at velja allar fýra nevndarlimirnar av nýggjum. Bjarni Djurholm nevnir í hesum sambandi, at hann hevur mett tað sum sína skyldu at tryggja sær, at minst ein av valdu limunum hevur eginleikarnar at vera formaður í nevndini, og tí er hann komin við síni meting um, hvør hesin kann vera.

Umsitingin í Vinnumálastýrinum gjørdi sítt tilmæli, og av teimum fýra, sum landsstýrismaðurin síðan valdi, metti umsitingin allar at vera fakliga kvalifiseraðar. Men í tveimum førum metti umsitingin, at talast kundi bæði fyri og ímóti, m.a. orsakað teirra luttøku í ymiskum vinnuligum viðurskiftum.

Bjarni Djurholm valdi tó at halda fast um tey fýra, sum hann hevði valt. Hann metti, at teir veikleikar, sum umsitingin hevði víst á, ikki vóru av týdningi í mun til teirra sterku síður, m.a. fakligu førleikar og hollu vinnulívsroyndir.

### Almennur kandidatlisti

Tá almennar nevndir skulu veljast, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum eitt yvirlit yvir persónar við vinnuligur kvalifikatiónum at nýta. Hesin »almenni kandidatlisti«, ella hugskotslisti, verður ikki roknaður sum endaligur, men sum ein leiðbeinandi listi til landsstýrismannin. Hesin listi varð millum annað nýttur, tá Bjarni Djurholm skuldi velja teir fýra nevndarlimirnar í Framtaksgrunnin.

### Undanfarna nevnd ikki nøktandi

Bjarni Djurholm sigur, tað valdaði ikki nøkur ósemja millum seg og nevndin í Framtaksgrunninum, sum sat áðrenn sitandi nevnd tók við í vár. Tvørturímóti hevur hann fleiri ferðir gjørt vart við, at hann sum heild var væl nøgdur við avrikini hjá undanfarnu nevnd.

Men hóast eingin ósemja var, so drógu undanfarna nevnd og landsstýrismaðurin ikki heilt somu línu í spurninginum um Fiskavirking og Fiskasøluna. Bjarni Djurholm sigur, at hann við jøvnum millumbilum spurdi nevndina og formannin um, hvørjar ætlanir tey høvdu við hesum fyritøkum, sum Framtaksgrunnurin eigur einsamallur.

Bjarni Djurholm vísir á, at í ásetingunum fyri Framtaksgrunnin stendur beinleiðis, at »Fonden skal afhænde foretagne investeringer, når disse har vist sig levedygtige og salgsbare«. Og harumframt stendur í strategiskjalinum fyri grunnin, at »Tá ið gjørdar íløgur vera burðardyggar, skulu hesar seljast og virðisøking Framtaksgrunsins realiserast. Íløgurnar verða at selja til medeigara, aðrar fyritøkur, ella á einum komandi partabrævamarknaði.«

Bjarni Djurholm sigur, at hann fleiri ferðir gjørdi nevndina varuga við, at tað kom lítið ítøkiligt undan kavi, sum livdi upp til ásetingarnar í viðtøkunum, og at nevndin tí átti at hava í huga, at hóast talan ikki var um nøkur boð, so átti nevndin at geva sær far um, at landsstýrismaðurin hevði nakrar skyldur mótvegis løgtinginum. Tí landsstýrismaðurin skal til eina og hvørja tíð kunna svara fyri, hvussu viðtøkur grunsins verða fylgdar, og eisini vátta, at tær veruliga verða fylgdar. Tá Bjarni Djurholm í vár skuldi velja fýra nevndarlimir av nýggjum, var sum nevnt ætlanin, at tveir teirra skuldu halda fram. Við hesum vildi landsstýrismaðurin tryggja sær kontinuitet í nevndini, og harumframt hevði hann álit á fakliga førleikanum hjá teimum. Sostatt metti hann tað vera nóg mikið, at tveir nevndarlimir, møguliga tríggir, um fimti limurin ikki gjørdist tann sami, komu nýggir inn í nevndina.

### Merkiliga nógv rumbul

Bjarni Djurholm heldur, at tað er hugvekjandi, hvussu nógv uppmerksemi nevndarvalið í Framtaksgrunninum hevur fingið. Serliga tá havt verður í huga, at áður hava nevndarval, har umsitingin í flestu førum ikki havt serligan leiklut, ikki havt stórvegis áhuga.

## Hesi manna í dag nevndina í Framtaksgrunninum:

**Formaður:**
Niels Winther Poulsen, advokatur
**Næstformaður:**
Dagmar Joensen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins
**Hini í nevndini, vald av landsstýrismanninum:**
Sjúrður Horsdal, vinnulívsráðgevi og stjóri í Zenit
Eydna Justinussen, Fíggjar- og roknskaparleiðari á Føroya Lívstrygging
**Fimti limurin, valdur av nevndini:**
Árni M. Dam, vinnulívsmaður



# Gátan um páskaløgin

**Í rættarmálinum millum fútan og Restoffs bryggjarí snýr høvuðsspurningurin seg um, hvør ætlanin var við lýsingini, har skrivað stóð um "páskaløgur".**

RÆTTARMÀL
*Heri á Rógvi*

Hvat merkir páskaløgur? Orðið stóð at lesa í lýsing frá Restoffs bryggjaríið í Dimmalætting hin 26. mars. Hendan lýsingin snúði seg um Restorffs bryggjarí, og innihaldið var ein tekstur, har orðið "páskaløg" kom fyri. Eisini var ein tekning á lýsingini av teimum báðum Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen. Á tann teknaða Óla Svenn stendur orðið øl. Tað er tann greiða fatanin hjá ákærumyndugleikanum, t.e. fútin, at hendan lýsingin er gjørd og hevur til endamáls at fremja søluna av rúsdrekka, t.e. drykkir við einum alkohol-innihaldið áljóðandi 4,6% ella 5,8%.

Fútin segði í sínari procedure, at tað var eingin ivi um, at lýsingin snúði seg um rúsdrekka, og samanhangurin vísti púra greitt, at Restoffs við lýsingini hevði til endamáls bevíst at fremja søluna av rúsdrekka.

Verjin hjá P/F Restoffs, Halgir W. Poulsen, helt hinvegin, at stjórarnir hjá Restoffs, Johan Mortensen og Òli Svenn Nolsøe, handlaðu í góðari trúgv, tí teir vórðu ikki kunnaðir um, at hetta slagið av lýsingum ikki varð loyvt, tá ið hugsað varð um, at líknandi lýsingar eisini høvdu verið at sæð frammanundan.

### Løgur

Hóast bæði ákæri og verji ferðaðust ógvuliga víða á rætarfundinum fríggjadagin, tá ið málið kom fyri Jørgen Petersen í Føroya rætti, so snýr málið seg í tí stóra og heila um, hvat týdningurin av orðinum "páskaløg" merkir.

Verjin vil vera við, at hetta kann merkja øll slag av drykkum, ið Restorffs bjóðar. Ákærin vil hinvegin vera við, at tað er greitt, at í lýsingini verður hugsað um øl.

Tað er nevniliga ikki loyvt at lýsa við rúsdrekkadrykkjum við hægri styrki enn ljós pilsnara styrki í føroyskum fjølmiðlum ella tíðarritum. Hetta stendur at lesa í rúsdrekkalógini, og tað er hendan lógin, sum nú sleppur at standa sína roynd.

Er tað at lýsa við sterkum rúsdrekka á henda hátt? Visti bryggjaríið av, hvat tað gjørdi?

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at tað er bryggjaríið sjálvt, og ikki Johan og Óli Svenn, sum eru ákærdir í málinum.

Sjálvur var Óli Svenn Nolsøe einasta vitnið í málinum. Hann greiddi frá, at teir hava vent gongdini hjá Restoffs. Hann vildi vera við, at Restorffs var mestsum at rokna sum ókent fyri onnu enn havnafólk, áðrenn teir tóku við hin 1. januar 2002. Hann segði seg hava sæð lýsingina, áðrenn hon varð send til prentingar, og hann helt ikki, at talan var um nakað lógarbrot.



*Johan Mortensen og Óli Svenn Nolsøe krevja frídøming í Føroya rætti fyri ákæruna um lýsingar við rúsdrekka. Ákærin krevur eina bót á leið 10.000 kr. Dómur verður sagdur fríggjadagin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Hann kendi seg vera skeivt endurgivnan, tá hann hevur skula sagt, at lýsingin varð gjørd fyri at provekera og fyri at royna lógina.

Áhoyrarafjøldin, ið fyri tað nógva vóru umboð frá størru føroysku fjølmiðlunum, fingu eina undirhaldandi løtu í rættinum fríggjamorgunin.

Halgir W. Poulsen, verji, legði ógvuliga bragdliga fyri og legði stóran dent á føroyska dupultmoralin, og tað "fullkomiliga absurdu" lógina, talan er um í hesum førinum.

Spurningurin er so, hvørja ávirkan hetta fær á dómaran.

Bæði verji og ákæri góvu alt teir orkaðu við at vísa greinir úr føroyskum bløðunum, sum teir mettu vísti støðuna á økinum í Føroyum.

Eisini varð nógv tosað um Rúsdrekkasølu landsins og hennara leiklut og "upplýsandi" tilfar. Somuleiðis snúði nógv prát seg eisini um útlendskar miðlar, sum frítt kunnu lýsa við rúsdrekka í Føroyum.

Bæði verji og ákæri royndu dúgiliga at vísa á siðvenju á økinum, sum ikki hevur verið so ofta á gátt hjá Føroya rætti, men vend kann koma í.

### Dómur sagdur fríggjadagin

Jørgen B. Petersen, dómari, fer fríggjadagin í komandi viku at siga dóm í málinum móti Restoffs bryggjarí. Dómurin verður sagdur kl. 12.00.

Varafútin Finn Ougaard, sum eisini er ákæri í málinum móti Restorffs, segði í rættinum fríggjadagin, at ákæri er reist um greinir í Dimmalætting við uppskriftum, har nýtt verður øl hjá Føroya Bjór til at gera matin.

### Málið útsett

Friggjadagin kom ákæran hjá fútanum móti Club 20 eisini fyri rættin. Vitni vórðu avhoyrd í málinum, men tað skal ein annar rættarfundur til, áðrenn málið endaliga klárt til dóm. Tveir løgreglumenn skulu avhoyrast í málinum, og teir vóru ikki til staðar í rættinum fríggjadagin, og tískil er nýggjur fundur avtalaður.

Ákæran móti Club 20 snýr seg eisini um ásetingarnar í rúsdrekkalógini um lýsingar við rúsdrekka.

# Tveir barna-garðar reistir

Fríggjadagin vórðu tveir barnagarðar reistir í Tórshavnar kommunu. Talan er um barnagarðar í Løgmannabreyt í Hoyvík og á Hamrinum á Argjum. Heðin Mortensen, virkandi borgarstjóri í Havn, sigur, at nýggju barnagarðarnir vilja geva pláss til 120 børn afturat.

Eftir ætlan verða barnagarðarnir tiknir í nýtslu í apríl komandi ár. Samlaði kostnaðurin fyri barnagarðarnar er 21 milliónir kr. Tórshavnar býráð miðjar ímóti at gera ein enda á bíðilistanum, tá hetta valskeiðið er liðugt. Ætlanir eru um byggjan av fleiri ørðum barnagørðum í næstum.

**-HR**





*Nýggju barnagarðarnir á Hamrinum á Argjum og við Løgmannabreyt eru nú reistir.*